## Flogbóltur í Badmintonhøllini

Fram hevur óvanligan heimavøll í Badmintonhøllini, tá teir í kvøld, fríggjakvøldið, taka móti SÍ. Men hetta eigur tó ikki at forða havnarliðnum í at stremba móti oddinum. Hjá Fram kom tað væl við, at teir megnaðu at basa ÍF í miðvikuni, og tann sigurin ber við sær, at bronsan at kalla er heima. Enn er tó eisini møguleiki fyri betri metalli, men tað krevur so ein sigur móti botnliðnum.

## Klassikarin í Havn

Dystirnir millum Fleyr og Mjølnir hava mangan verið avgerandi fyri meistaraheitið, og hjá Mjølni stendur gulldreymurin í øllum førum upp á spæl, tá teir vitja í Havn sunnudagin. Fleyr er dragnað nakað í kappingini, og tí kann hugsast, at teir ikki longur eru heilt so motiveraðir, sum teir hava verið onkran dystin. Mjølnir kann hinvegin koma heilt nær ÍF við einum sigri.



nervum fyrstu løtuna, og so er spurningurin, hvør sleppur fyrst av við teir. Eitt er tó sikkurt, vit ætla okkum at vinna dystin.

VB hevur fleiri góðar leikarar í hópinum, men liðið fær ein stóran styrk til steypafinaluna. Tá kemur Gurið Mortensen nevniliga heim, og Rannvá dylir ikki fyri, at Gurið kann gerast ein týdningarmikil leikari.

- Gurið hevur nógv at siga, serliga í slíkum dystum. Hon torir at fara sjálv, og er ikki bangin fyri at taka ávísar møguleikar. Hon kann fáa stóran týdning fyri okkum í hesum dystinum.

### Gott tak á teimum seinast

Tað er ikki so langt síðani, at VB og Stjørnan møttust seinast. Tá brustu liðini saman í Vági, og hesin dysturin gjørdist sera spennandi. Stjørnan vann at enda við einum máli, men dysturin kundi koppað báðar vegir.

Rannvá heldur, at VB hevði gott tak á Stjørnuni henda dagin.

- Tann dystin høvdu vit ótrúliga gott tak á teirra vengrum, og vit kláraðu at steðga teirra trýsti frá vengrunum. Tá høvdu vit tó trupulleikar av teirra bakspælarum, og hetta skulu vit bøta um í steypafinaluni. Her skulu vit hava eitt serliga vaki eyga við Alinu Olaru og Simonu Petersen, sum eru ótrúliga sterkar.

- Annars vænti eg, at málverjarnir kunnu fáa stóran týdning fyri ein slíkan dyst. Til tíðir kunnu teir taka broddin av mótstøðuliðunum, og hetta kann blíva avgerandi í finaluni, sigur Rannvá.

At enda sigur hon, at verjan hjá VB fer at hava stóran týdning í hesum dystinum.

- Verjan hjá okkum kemur at hava nógv at siga. Vit mugu bara fara út á vøllin og geva alt tað, vit eiga, og so mugu vit vóna, at vit fara at vinna dystin.

# Mugu arbeiða við tí mentala

**- Eg haldi, at vit hava eitt sterkari lið enn teir, men á tí mentala økinum eru teir helst sterkari enn vit. Hetta sigur Ingi Olsen hjá VÍF, sum vónar, at vestmenningar fara at koppa strandingum í ár**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

VÍF hevur helst saman við Kyndli verið fremsta hondbóltsfelag í føroyskum manshondbólti tey síðstu nógvu árini. Hesi bæði liðini hava í nógv ár kempað um meistaraheitið, men í steypakappingini hevur gingið heldur striltið hjá vestmenningunum. Ikki tí, teir hava mangan verið í finaluni, men her hevur eitt triðja lið, StÍF, stolið myndina tey síðstu árini. Seinastu tvey árini hevur VÍF møtt StÍF í steypafinaluni, men í báðum førunum hava strandingar drigið longra stráðið.

Aftur í ár er VÍF partur av steypafinaluni, og triðja árið á rað er mótstøðuliðið StÍF. VÍF hevur havt eitt sera gott kappingarár í ár, har teir liggja á odda í landskappingini, og tí eru teir helst eisini favorittar undan finaluni í Coca Cola-kappingini. StÍF hevur tó steypasigrarnir undanfarnu árini at vísa á, og tí er spurningurin, um VÍF fer at koppa strandingum hesa ferð.

### Sterkari lið enn teir

VÍF hevur verið onkrar av teirra stuðulsleikarum fyri uttan seinastu dystirnar. Fyrr í ár bleiv málmaðurin, Dejan Lacok, skaddur, og hann verður ikki við til dystin. Sterki vongurin, John Zachariassen, hevur heldur ikki verið við síðstu dystirnar, men Ingi Olsen hjá VÍF sigur, at hann helst verður við leygardagin.

- John hevur vant í vikuni, so hann verður við í dystinum leygardagin. Sjálvandi er ilt at meta um, hvussu leingi John klárar at spæla, men hann verður í øllum førum á beinkinum.

Ingi sigur annars, at vestmenningar eru optimistiskir undan dystinum.

- Vit hava góðar vónir til dystin. Eg haldi, at vit hava eitt sterkari lið enn teir, og eg vóni, at hetta fer at tryggja okkum sigurin. Tó skal leggjast afturat, at teir á onkrum økjum eru heldur sterkari enn vit. Kanska serliga á tí mentala, hvat viðvíkur steypakappingini.

### Teir hava nakrar stórar styrkir

Ein av leikarunum hjá StÍF hevur verið fram úr góður tey síðstu árini. Rumenski málverjin, Marian Cirloganescu, hevur mangan tikið broddin av mótstøðuliðunum, og Ingi Olsen er eisini greiður yvir, at Marian hevur nógv at siga fyri strandingar.

- StÍF hevur nakrar stórar styrkir á liðnum. Marian í málinum er helst tann største av teimum. Vit mugu endiliga ikki skjóta hann heitan, tí er hann fyrst komin í gongd, so kann hann næstan avgera ein dyst einsamallur.

- Ein onnur av styrkjunum er Finnur Hansson. Finnur er ein sera góður spælari, og geva vit honum ov nógv pláss, so er hann ringur at steðga. Harafturat hava strandingar fleiri aðrar góðar leikarar, sum kunnu gera um seg, og m.a. ein Leivur Justinusen hevur víst gott spæl síðstu dystirnar, sigur Ingi Olsen.

At enda sigur Ingi, at rutinan kann gerast avgerandi í einum slíkum dysti, og her heldur hann, at steyparutinan hjá strandingum ger, at teir trúgva sera nógv uppá steypakappingina. Hann sigur seg tó ikki vóna, at hetta fer at avgera dystin til teirra fyrimuns, tí hann heldur, at møguleikin hjá VÍF er veruliga til staðar í ár.



*Ingi Olsen heldur, at møguleikin hjá VÍF veruliga er til staðar í ár. Men so má liðið eisini vera sterkari á mentala økinum, enn teir hava verið*